


# Sjóndepilin søkir eftir starvsfólki

**Søkt verður eftir starvsfólki til dagtilhaldið og vart verkstað í fast starv við 35 tímum um vikuna.**

**Sjóndepilin hevur tríggjar sjálvstøðugar eindir:**
Ráðgevingin og Dagtilhaldið á Íslandsvegnum og Verkstaðið á Traðabrekku.

Dagtilhaldið hevur eina virkna vevstovu, ið framleiðir ymiskar vovnar lutir til sølu. Ymiskt handaligt arbeiði umfatar hornarbeiði , tøving, binding o.m.a.

Á verkstaðnum eru ymiskar handaligar og sosialar uppgávur. Borgararnir her eru sjónveikir og lættari seinmentir.

**Starvið umfatar** - við veving sum høvuðsyrki:

- upptøkuprát og samskipan
- leggja arbeiði til rættis
- vegleiða, læra og rætta
- eftirskoða gjørt arbeiði
- montera
- fyriskipa felags tiltøk
- samskifti við avvarandi
- innkeyp av tilfari

Starvsfólkið søkt verður eftir, kemur at verða ein partur av framleiðslutoyminum.

**Krøv til fakligar førleikar:**

- hollan kunnleika til veving
- førleikar innan ymiskt handarbeiði
- telduførleika

**Krøv til persónligar førleikar:**

- jalig(ur) og tolin
- hevur hugflog og evnir at læra frá sær
- góð samstarvsevnir og ert fyrikomandi
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og ert málssøkin

**Sjóndepilin bjóðar:**

- fakliga frálæru um sjón og sjóntrupulleikar
- atlit og arbeiðshættir

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Almanna- og Heilsurøktarafelagið.

Starvið verður sett frá 1. februar ella eftir nærri avtalu. Skrivlig umsókn við prógvum og CV skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. desember 2018.

**Umsóknir skulu sendast til:**

**Sjóndepilin**
att. leiðarin
boks 2074
FO-110 Tórshavn
Teldupost: kak@sjondepilin.fo

Eru fyrispurningar, kunnu tit ringja á tlf. 31 82 22 og spyrja eftir leiðaranum.

Meira kunning á www.sjondepilin.fo